LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi til havnadeildina hjá stovninum.

Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum mátingum og øðrum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru hesar:
• Gera ætlanir fyri landshavnum
• Hevur hald og rakstur av havnum og lendingum um hendi
• Fysisk planlegging á sjónum
• Programmeringar, forkanningar og prosjektgransking
• Eftirlit við verkætlanum og
• Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi – helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum.

Harafturat kundu vit hugsað okkum at umsøkjarin hevur edv kunnleika viðv. scripting, dátugrunni, dynamiskari heimasíðu og hagfrøðiligari dátuviðgerð.

Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, skal duga at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til Landsverkfrøðingin, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. januar 2002. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til havnadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Ewaldi Kjølbro á tel. 31 13 33, lokal 316, (e-postur: ewald@lv.fo) ella fartel. 227864.

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Verkfrøðingur til planlegging og prosjektering

Starv sum verkfrøðingur á plan- og prosjektdeildini hjá Landsverkfrøðinginum er leyst at søkja.
Plan- og prosjektdeildin er deild undir vegadeildini.
Til rætta fólkið kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru hesar:

• Gera ætlanir fyri landsvegakervinum
• Gera ætlanir fyri trygdartiltøkum
• Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
• Eftirlit við verkætlanum og
• Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi – helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum.
Neyðugt er at viðkomandi hevur vanligan telduførleika. Umframt tey vanligu forritini, nýta við harafturat Microstation og onnur serforrit innan vegaprosjektering.
Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til

**Landsverkfrøðingin**
Postboks 78
110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. januar 2002. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til vegadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durhuus, leiðari av vegadeildini, á tel. 31 13 33, lokal 212, (e-postur: finnleif@lv.fo).




*Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eitt gott komandi ár*

**Opið um jólini:**
Jólaaftan, jóladag og
2. jóladag verður stongt.
Latið verður uppfatur
hósdagin 27/12 kl. 07.00 fp

**Opið um nýggjárið:**
Nýggjársaftan er opið til kl. 14.
Nýggjársdag er stongt.

mylnan
Berjabrekka 1 - tlf. 314456



# Finnbogi atkvøddi fyri egnan vinning

**Finnur Helmsdal, tjóðveldistingmaður, rýmdi av tingfundi, tá fíggjarlógin skuldi samtykkjast, tí aðrir samgongulimir atkvøddu fyri uppskoti frá andstøðuni. Tað var fyri at fáa persónligan vinning burturúr, sigur hann. Finnbogi Ísakson, tingmaður, svarar, at tað kann ein tingmaður altíð leggjast undir**



*Finnbogi Ísakson hartar partamann á Løgtingi fyri at støkka undan, tá atkvøðast skuldi um fíggjarlógina. Hann leggur Finn Helmsdal undir at vera bæði stuttmintan og sjálvsrættvísan, tí hesin hevur havt at Finnboga Ísaksyni fyri at atkvøða fyri andstøðuppskoti á tingi*

FLOKSÓSEMJA
*Edvard Joensen*

Finnbogi Ísakson, tjóðveldistingmaður, hartar í tíðindaskrivi ein annan tjóðveldismann á tingi, Finn Helmsdal, fyri at rýma úr tinginum í hevnisøku fyri, at millum aðrar Finnbogi Ísakson tók undir við einum andstøðuuppskoti.

Finnur Helmsdal, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, leggur partamannin, Finnboga Ísakson, undir at atkvøða fyri einum andstøðuuppskoti um meira pengar til tvey viðgerðaheim í Suðurstreymoy til tess at draga pening til egið valdømi og harvið vinna sær sjálvum nakrar eyka atkvøður til eitt komandi val.

– Slíkt kann ein tingmaður altíð leggjast undir, svarar Finnbogi Ísakson. Líka mikið hvat hann atkvøður, kann hann leggjast undir at hugsa um egnan fyrimun.

### Onnur grund

Men grundin til, at Finnbogi Ísakson hevur sent eit tíðindaskriv út, har hann harðliga finst at atburðinum hjá partamanninum, Finni Helmsdal, undir fíggjarlógarviðgerðini, er ein heilt onnur og nógv álvarsligari, sigur hann.

Veruliga grundin til, at Finnbogi Ísakson hevur sent tíðindaskrivið er, at hann ikki er nøgdur við, at Finnur Helmsdal loypur frá eini atkvøðugreiðslu um sjálva fíggjarlógina, sum er so sera prinsippiell.

– Hetta er fyrstu ferð, ein fíggjarlóg er komin fyri, har skorið verður av blokkinum. Vit hava verið bangnir fyri, at onkur av samgonguflokkum okkara ikki fór at orka at standa undir og hoknað, tá til stykkis kom. Men nú vísti tað seg, at tað var ein tjóðveldisatkvøða, sum manglaði, tá atkvøðast skuldi, sigur Finnbogi Ísakson.

Tað metir hann so álvarsligt, at hann hevur heitt á leiðslu Tjóðveldisfloksins um at taka málið til viðgerðar, eins og hann væntar, at tað onkursvegna fær avleiðingar fyri Finn Helmsdal.

Finnbogi Ísakson leggur dent á, at tað er tjóðveldistingmaðurin, Finnbogi Ísakson, sum skrivar tíðindaskrivið, og ikki løgtingsformaðurin.

### Svíkar

Finnur Helmsdal metir hinvegin ávísar tjóðveldismenn, teirra millum Finnboga Ísakson, sum svíkar, tá hesir atkvøða fyri einum andstøðuuppskoti um at játta meira pening av fíggjarlógini millum aðru og triðju viðgerð.

– Slík uppskot verða bara sett fram fyri at seta kílar í samgonguna, og tað eydnaðist eisini í hesum førinum, tí millum annað Finnbogi Ísakson skuldi hava persónligan vinning av at atkvøða so, sigur Finnur Helmsdal.

At Finnbogi Ísakson í tíðindaskrivi vísir á, at tað, sum gjørt varð, var ikki annað, enn Finnur Helmsdal sjálvur hevur gjørt, hevur lítið upp á seg, sigur Finnur Helmsdal.

Hann váttar á, at hann hevur atkvøtt við andstøðuni fyri at lata júst somu viðgerðarstovnum pening.

– Men ta ferðina var als ikki talan um at hækka játtanina, sigur Finnur Helmsdal. Tá var talan um at fáa støðið á játtanini aftur á tað, hon varð, áðrenn byrjað varð at skarva av allastaðni. Hesaferð var aftur í móti talan um beinleiðis hækking.

Men har er Finnbogi Ísakson ósamdur. Í hansara verð var bara talan um at fáa játtanina at liggja á sama støði, sum alt annað í fíggjarlógini, sum er hækkað.

– Alt er hækkað, vísir hann á, uttan onkur hendinga grein sum nú hendan við viðgerðarstovnunum. Tí var bara talan um dagføring og ikki hækking.

### Hjartamálið

Finnur Helmsdal dugir ikki at skilja í millum smáting og tað, sum veruliga hevur nakað upp á seg.

Hann rýmdi orsakað av nøkrum fáum krónum, sum millum annað Finnbogi Ísakson atkvøddi fyri. Men samstundis atkvøddi hann ikki fyri tí stóra málinum hjá samgonguni, nevniliga fíggjarlógini.

– Og tað er álvarsligt, heldur Finnbogi Ísakson. Tí í henni liggur sjálvt hjartamálið hjá Tjóðveldisflokkin. At vit skulu standa á egnum beinum. Og nú, tá møguleiki var fyri at lækka blokkin, var Finnur Helmsdal burtur.

– Eg skal ikki siga, at hann rýmdi fyri at sleppa undan at taka støðu til at lækka blokkin og so bara brúkti hitt málið sum undanførslu. Men onkur kann leggja tað soleiðis út.

At Finnbogi Ísakson vil hava leiðsluna í Tjóðveldisflokkinum at viðgera hetta álvarsmálið, sum hann málber seg, tekur Finnur Helmsdal heilt róliga.

– Tað máttu verið onnur mál undan hesum, sum floksleiðslan átti at viðgjørt, sigur hann, men vil ikki siga nærri, hvat hann heilt nágreiniliga meinar við.

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksin, vil als onga viðmerking gera til málið.

